# Bridge vil ikki tosa við Terry

Spenningurin í Onglandi er stórur, nú Ongland tann 3. mars skal venjingardyst móti Egyptalandi. John Terry, sum nú er avsettur sum liðskipari, skal her hittast við Wayne Bridge, og er hetta fyrsta ferðin, at teir báðir hittast, síðani tað kom fram, at Terry hevði gjørt unnustuna hjá Bridge við barn. Terry hevur fleiri ferðir roynt at sett seg í samband við Bridge, men hesin hevur ikki tikið telefonina, tá fyrrverandi liðfelagin í Chelsea hevur ringt.



# Ronaldo hugsar enn um Manchester

Cristiano Ronaldo vil ikki nokta fyri møguleikanum, at hann eina ferð í framtíðini aftur verður at síggja í Manchester United. – Eg fylgi framvegis við í tí, sum fyriferst í felagnum, og tú veitst jú ongan tíð, um eg í framtíðini aftur spæli fyri felagið. Tí sjálvandi sakni eg tað. Eg hevði seks góð ár í felagnum, og eg havi nógvar vinir har, sigur Ronaldo, sum tó leggur dent á, at hann í løtuni stórtrívist í Real Madrid.

løtuna undan steðginum mistu tær gulu luftina. Stjørnan fekk við trimum málum á rað skapt sær eina hampuliga trygga leiðslu, og hendan varð útbygd fyrstu løtuna eftir steðgin.

VÍF, sum annars hevði spælt púrasta óimponerað, framdi fleiri teknisk mistøk hesa løtuna, og hóast Stjørnan eisini misnýtti nakrar møguleikar, so fingu tær lagt somikið av sjógvi niður til mótstøðuna, at spenningurin av álvara var burturi.

Og so ráddi bara um hjá Stjørnuni at koyra sigurin heim. Smílini á spælarunum boðaðu frá, at tær nú vóru púrasta vísar í sigrinum, meðan VÍF hinvegin eisini hevði mist vónina um, at stóra takið var gjørligt.

## Sita enn á trúnuni

Sigurin í steypakappingini er tann sætti hjá Stjørnuni í sjey ár, og tað í sjálvum sær er einki minni enn imponerandi.

Við grundarlagi í einum sterkum lokalum buli, sum enn hongur væl og virðiliga í, hevur Stjørnan ein hóp, sum er bæði breiðari og sterkari enn hjá flestu mótstøðuliðunum, og tað hevur aftur elvt til ein sera sterkan vinnaramentalitet.

Tilgongdin av spælarum sum Kristinu Griksaite, Simonu Petersen, Duritu Christophersen og Valentinu Suciu hevur verið rómin á lagkøkuni í so máta, og hóast einki gull-merki kann garanterast við vissu, so er eingin ivi um, at Stjørnan við hesum hevur tilfarið, sum kann vinna FM-heitið aftur frá Tjaldri, sum í fjør tók sær av tí partinum.

Í tí stríðnum sleppur VÍF ikki reiðiliga upp í part enn, men eftir bara hálvt ár í bestu deildini hevur liðið prógvað, at har veruliga eru góð hondbóltsevni at byggja eina sterka framtíð á. Enn er liðið sera ungt, og tí kann útfallið í einstøku dystunum vera nakað stórt til tíðir, men eisini tann trupulleikan er liðið komið væl ávegis at loysa. Og hóast tað vóru tær, sum máttu taka til takkar við silvurmerkjunum, so kundu tær væl og virðiliga standa uppræ ttar, tá dysturin var av. Ein dystur, har VÍF prógvaði, at talan ikki var um nakað walk-over hjá Stjørnuni, soleiðis sum fleiri annars høvdu spátt undan dystinum.




**Steypavinnarar 2010, Stjørnan: Standandi frá vinstru eru tað Jógvan Leivur Nolsøe, liðleiðari, Hanna Mikkelsen, Sylvia Løvenskjold, Durita Mikkelsen, Ella Petersenn, Durita Christophersen, Durita Ljósstein, Simona Petersen, Annika Ljósstein, Valentina Suciu, Morten Huust Pedersen, venjari, Sylvan Jacobsen, liðleiðari. Húkandi eru Joan Midjord, Judith Hansen, Diana Poulsen, Kristina Griksaite, Maria Ziskason, Edith Hansen, Bára Skaale Klakstein og Una Olsen**

Mynd: Álvur Haraldsen



**Durita Christophesen, Annika Ljósstein og Durita Ljósstein bóru Unu Olsen í gullstóli, tá hon skuldi taka ímóti steypinum**

Mynd: Álvur Haraldsen

## FAKTA

**Stjørnan-VÍF 29-22 (14-10)**
**10 min:** 6-5
**20 min:** 10-8
**40 min:** 20-14
**50 min:** 26-19
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Simona Petersen 8(2/2), Durita Ljósstein 4, Joan Midjord 3, Judith Hansen 3, Una Olsen 3, Annika Ljósstein 3, Bára Skaale Klakstein 2, Valentina Suciu 2, Durita Mikkelsen 1
Kristina Griksaite, Ella Petersen, Edith Hansen, Maria Ziskason, Diana Poulsen
**VÍF:** Liljan Djurhuus 8(2/4), Tóra Seloy 7, Heidi Joensen 3, Elisa Leo 2, Agnas Olsen 1, Halla Midjord 1
Steinbjarta Egholm, Finngerð Jensen, Rakul Joensen, Vivian Petersen, Marita á Rógvi, Johanna Gunnlaugsdóttir, Linda Daviesen, Torgun Johansen.
**Brotskøst:** Stjørnan 2, VÍF 4
**Útvísingar**
**Stjørnan 5:** Judith Hansen 2, Annika Ljósstein 2, Durita Mikkelsen 1
**VÍF 4:** Agnas Olsen 1, Finngerð Joensen 1, Liljan Djurhuus 1, Rakul Joensen 1
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen

# Errin av spælarunum

**Avrikið var gott, men Kári Mortensen harmaðist, at munurin ikki var minni enn tey sjey málini, sum talvan at enda vísti**




Jákup Mørk

Hóast hansara lið stóð eftir sum tapari av kvinnufinaluni, so vr Kári Mortensen á ongan hátt ónøgdur um tað, sum hansara spælarar høvdu avrikað.

- Vit vistu, at vit kundu hanga væl í teimum. Men vit hava ikki rutinuna, og tí gera vit mistøk í avgerandi løtum. Vit eru fýra mál aftan fyri í steðginum, og vit brenna nakrar upplagdar møguleikar júst um tað mundi, so vit kundu verið nógv betur við. So á tann hátt er talan um eitt gott avrik.

So tú ert á ongan hátt ónøgdur um úrslitið, sum at enda segði, at sjey mál vóru á muni?

- Eg eri ikki ónøgdur við avrikið. Men eg eri eitt sindur ónøgdur um, at vit ikki hingu enn betur í teimum. Tí tað kundu vit væl havt gjørt.

So tað eru kanska nøkur ár, nakrir sentimetrar og nøkur kilo, sum skulu afturat, áðrenn tit veruliga kunnu takast við Stjørnuna?

- Eg eri ikki vísur í, at tað eru so nógv ár, segði Kári Mortensen til hendan seinasta spurningin.